# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Viðgera orkumál sum heimsborgarar

Tað kom sera dátt við, tá miðlar um allan heim í gjár avdúkaðu, at Bushstjórnin í USA í áravís hevur givið vísindafólkum í eitt nú almennari tænastu kjaftband í sambandi við gransking og kanningar av altjóða veðurlagsbroytingum. Eftir øllum at døma hava Bush, Cheney og aðrir av heykunum í stjórnini sett sær fyri at forða fyri, at sannleikin um ávirkanina CO2 útlátið hevur á veðurlagið á knøttinum er komin út til almenningin. Hetta helst fyri at gagna eitt nú oljuáhugamálunum hjá m.a. Cheney varaforseta og somuleiðis áhugamálum hjá Bushfamiljuni í oljuídnaðinum.

Samtíðis sum henda dáragerð er avdúkað letur ST almennakunngera eina frágreiðing, sum staðfestir, at CO2 útlátið hevur stóra ávirkan á veðurlagið, at mannaættin er við til at taka grundarlagið undan sær sjálvum so við og við, og hon heitir á heimsins tjóðir um at minka um dálkingina í stundini.

Hetta er í tøkum tíma, tí stórt lobbyarbeiði hevur leingi verið gjørt frá fleiri av teimum multinationalu feløgunum og høgrastjórnum í fleiri londum í Vesturheiminum, eitt nú USA at gera til einkis ávaringarnar frá vísindafólkum um mannaelvandi veðurlagsbroytingarnar.

Tað er gott, at hetta kemur fram júst nú, tá eisini vit í Føroyum skulu til at gera okkum hugsanir og meiningar um hetta álvarsmál, sum vit øll, lítil og stór lond, eru partur av. Kyotosáttmálin er til viðgerð í samfelagnum í løtuni og sama við framtíðar føroyska orkupolitikkinum. Hesi bæði eru so aftur tengd saman. Um eina góða viku verður aðalorðaskifti á løgtingi um orkupolitikkin, og vónandi fer kjakið og tær frágreiðingar, sum eru komnar fram úti í stóru verð, eisini at eiga pláss í hesum orðaskifti. Spurningarnir um orkuframleiðslu og nýtslu og spurningurin um umhvørvið eru nær tengdir, og tí eiga vit at taka teir undir eitt, tá orkumálið verður umrøtt. Latið okkum fáa eitt breitt, gott og ærligt orðaskifti, og latið okkum viðgera hesi mál sum heimsborgarar og ikki bara avmarka tað til okkara egna tørv og gerandisdag.

**Sosialurin**

## Hagstovan má mennast

**JÓANES N. DALSGAARD**



Okkum manglar samfelagslig hagtøl í Føroyum. Talan er um ein álvarsligan og átroðkandi trupulleika, tí dagførd og nøktandi hagtøl eru ein fyritreyt fyri at allari samfelagsgransking og harvið fyri allari skipaðari samfelagsmenning.

Hagtøl skapa eina radarmynd av samfelagnum og tí umhvørvi, sum samfelagið er til í. Uttan hesa radarmynd ber ikki til at arbeiða miðvíst við samfelagsmenning. Hetta svarar til at sigla eitt skip í blindum. Til ber við góðum útkikki at forða fyri at rent verður á land, men tað er eisini alt. At vinna upp havn er sum at vinna í happadráttinum. Soleiðis er við føroyskari samfelagsgransking. Hon reikar í blindum.

At framleiða hagtøl er ein vísund fyri seg. Harumframt er hagtalsframleiðsla tíðarkrevjandi og krevur nógva og køna starvsfólkaorku. Samanbera vit Føroyar við Svøríki, Ísland og Danmark, so áttu 65-80 fólk at starvast á Hagstovu Føroya. Talið í dag er 15. Vit mugu soleiðis staðfesta, at samanborið við okkara grannalond er samfelagsvísundalig hagtalsframleiðsla eitt niðurraðfest økið hjá okkum.

Hetta er sera álvarsligt. Uttan hagtøl ber ikki til at siga hvørji vit eru ella hvat vit gera, sum land og sum samfelag. Uttan hagtøl ber ikki til at granska og uttan gransking ber ikki til at siga, hvussu støðan er í samfelagnum – tað verið seg sosialt, búskaparliga ella politiskt – ella hvønn veg tað gongur. Fyri tað kunnu vit hava beina kós ímóti avgrundini, uttan at hava minstu áning um tað.

Neyvan er tað hetta, nakar føroyingur ynskir sær. Tí fari eg at mæla til, at allar góðar kreftir savnast um at uppbyggja eina nøktandi hagtalsframleiðslu í Føroyum. Hetta gerst við at styrkja Hagstovu Føroya bæði fíggjarliga og heimildarliga. Ein útbygging av hagstovnuni við 50-65 starvsfólkum kemur at merkja eina árliga meirnýtslu uppá ímillum 15 og 25 mió krónur, men hetta er ein neyðug íløga í framtíðina.

Uttan dagførd og nøktandi hagtøl hava vit onga radarmynd av samfelagnum og tí umhvørvinum okkara samfelag er til í. Uttan radarmynd fara vit fram eftir fummum. Nú verður so nógv tosa um radarmyndina av føroyska loftrúminum, sum er blivin burtur. Hetta er eitt álvarsligt mál. Men minst líka álvarsligt er tað, at vit ongantíð hava havt nakra radarmynd av føroyska samfelagnum.

Eg haldi, at tíðin nú eigur at vera komin til tess at vit geva samfelagsligari hagtalsframleiðslu í Føroyum hægstu raðfesting. Framtíðar føroyska samfelagið stendur uppá spæl!

Hvalvík 01.02.2007

## "PISA-kanning" í Føroyum í 1828

### Heimsins besti skúli tá á døgum?

**EYÐUN Á BORG**



Í "Dagbók" hjá týska fuglafrøðinginum, Carl Julian Graba, sum ferðaðist í Føroyum í 1828, verður greitt frá kanning av dugnaskapi næminganna í "Tórshavnar skúla". Eyðun Winther týddi. Hetta er sera forvitnisligur lesnaður, ikki minst í hesum døgum. Eg loyvi mær at endurgeva:

"Tórshavnar Skúli er bara tvey ára gamal. Í skúlan ganga 130 børn, gentur og dreingir, og har er ein dugandi lærari.

Yvirhøvur skriva børnini skjótt og væl; fyrisagnir vóru fyri tað mesta rætt og vakurt skrivaðar; torfør orð sum t.d. Generaltoldkammer, Admiralitetskollegium vórðu skrivað uttan villur.

Í royndini í landalæru vistu tey betur at greiða frá landamarkunum, amtunum, áunum og býunum á kortunum, sum eingi nøvn høvdu, enn eg, og tey høvdu sera gott skil á danskari søgu.

Størstu undran elvdi rokningin mær, serstakliga høvuðrokningin. Dømi sum: hvat eru 23 ferðir 19, 91 ferðir 11, 18 upp í 234, vóru neyvan framborin, so var svarið har úr høvdinum.

Eg fekk nú loyvi at yvirhoyra hvønn, eg vildi, og í hvørjum, mær hóvaði. Eg valdi ein drong, sum fyri 1 1/2 ári síðani hevði verið undirvístur í landalæru um Slesvík og Holstein. Eg spurdi hann um hesi londini, tað, sum júst kom mær í hug, og eg fekk so rætt svør, sum eg sjálvur hevði ikki kunnað givið betri.

So læt eg henda dreingin yvirhoyra ein annan o.u. 8 ára gamlan, og somuleiðis gekk tað frálíka væl. Síðan gav eg tí fyrra nøkur dømi í høvuðrokning og fekk yvirhøvur svarið næstan í somu stund, sum eg endaði spurningin.

Eggjaður umsíðir til at geva einum dreingi eitt torført roknistykki, læt eg hann fáa hetta: 17 13/18 pund kosta 30 dálar 5 markar 13 11/12 skillingar, hvussu nógv kosta 20 skippund 13 19/12 lispund? Knappar 10 minuttir seinni kom hann við úrslitinum: 12276 dálar 2 markar 5 1433/1695 markar. Rokni honum tað eftir, hvør, ið vil. Kann ein einstakur skúlalærari koma so væl áleiðis við so nógvum børnum eftir tveimum árum við at nýta tað gamla undirvísingarlagið?"

E.S. Ikki dugir undirritaði at rokna honum tað eftir, og ikki veit eg, hvussu undirvísingarlagið hevur tá á døgum, men hasin skúlin hevði helst verið nógv fremstur í heiminum í okkara PISA- kanningartíðum! Eg fái meg illa at trúgva, at "føroyski" skúlin skal vera so nógv versnaður síðani tá!?!

Við PISA-kvøðu

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.